## Eiga nú 100 milliónir í Føroya Banka

Sp/F 14, sum er tað felagið, sum fyrr átti Tórshavnar Skipasmiðju, eigur nú fimm prosent av partapenninginum í Føroya Banka. Fríggjadagin keypti felagið 6.203 partabrøv afturat. Tilsamans eigur felagið nú 500.000. Partabrøvini í Føroya Banka kosta í dag 220 kr. Sostatt er virðið á partabrøvunum hjá Sp/F 14 í Føroya Banka í dag 110 milliónir krónur. Frammanundan hava feløg hjá Jákup á Dul og Tjaldur (fyrrverandi Skipafelagið) keypt nakað oman fyri fimm prosent av partapenninginum. Stjórar í Sp/F 14 eru Poul Mohr og Gunnar Mohr (samb. ársroknskapi 05). Eigarar, sum eiga meira enn fimm prosent av partapenninginum í Sp/F 14 eru Mouritz Mohr og Gunnar Mohr.

## Hampiligt veður um vikuskiftið

- Tað verður turt og sólarglottar at hóma um vikuskiftið, lovar veðurmaðurin Petur Skeel. Leygardagin verður lítil vindur av ymsum ættum. Tað verður haraftrat turt og sólarglottar, kortini við møguleika fyri mjørkaflókum. Hinvegin verður rættiliga lýtt, millum 9 og 12 stig. Sunnudagin veksur hann vindin nakað av útsynningi, men tað verður framvegis turt og sólarglottar. - Mánadagin veksur hann vindin uppaftur meiri av útsynningi og suðri, men eg vænti at tað verður turt framvegis, sigur veðurmaðurin. Týsdagin og mikudagin verður hvassur vindur við 10 til 14 hitastigum. Týsdagin verður turt, men mikudagin ælingur.

# Kári verður toppkandidatur

**Sjálvstýrisflokkurin ætlar at sleppa sær úr politisku naggatódnini, sum hevur verið lagnan seinastu árini. Og til tess at økja um tingmannatalið hevur flokkurin styrkt listan í Suðurstreym, har Kára á Rógvi skal verða ein av toppkandidatunum**

UPPSTILLING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Við tí fyrivarni, at eingin uppstillingarfundur hevur verið enn, verður Kári á Rógvu ein av toppkandidatunum á listanum hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreymi til komandi løgtingsval*

Tað hevur leingi gingið sum slatur, at Kári á Rógvi skuldi stilla upp fyri Sjálvstýrisflokkin til komandi løgtingsval. Men tað hevur ikki borið til at at fingið hetta staðfest, serliga tí, at høvuðspersónurin sjálvur ikki hevur viljað vátta tað.

Men tað tykist nú vera mest sum fullvíst, at hann verður eitt av valevnunum á listanum.

Við tí fyrivarni, sum liggur í tí veruleika, at eingin uppstillingarfundur hevur verið enn, kann sláast fast, at so verður. Tað vátta keldur, sum standa flokkinum nær. Hesar somu keldur, sum kortini vilja verða ónevndar, siga eisini, at tað er rættiliga sannlíkt, at ein annar Kári, nevniliga við eftirnavninum Petersen, eisini verður at finna á listanum.

Men hetta vil Kári Petersen tó ikki vátta.

- Tað er rætt, at eg havi fingið eina uppringing frá Sjálvstýrisflokkinum, men tað er tað einasta. Eg havi onga støðu tikið enn, hvørki um eg fari at stilla upp, og í so fall fyri hvønn eg stilli upp, sigur Kári Petersen í stuttari viðmerking.

Hann vil ikki koma inn á, um hann fer at venda Javnaðarflokkinum baki, men tað er eingin loyna, at hann hevur verið sera ónøgdur við leiklutin, sum flokkurin hevur havt í hesari samgonguni, serliga tá tað kemur til fiskivinnupolitikkin. Men hann hevur altso ikki aðrar viðmerkingar.

### Styrkja miðøkið

Tá hugsað verður um, hvussu nær flokkurin var við at fáa mannin (sum altso var ein kvinna) valdan í Suðurstreym við seinasta val, mugu vónirnar um betri eydnu til komandi val vera góðar í miðstaðarøkinum.

Nú hevur sum nevnt eingin uppstillingarfundur verið enn í Suðurstreymi, men sambært Jákup Sverra Kass verða bæði fyrsti og annar fundur innan fyri einar fjúrtan dagar. Og tástaðni kann sigast við vissu, hvussu tendensurin fyri uppstillingini verður.

Men við Maluni Johansen aftur á listanum umframt nøkrum hampiliga tungum dreingjum aftrat má metast sannlíkt, at flokkurin kann tryggja sær umboð í Suðurstreymi. Og flokkurin vónar vælsaktans, at hetta umboðið ikki loysir eysturoyartingmannin av, men kemur sum eitt umboð aftrat á ting.

Hóast vit høvdu fingið lovað eina viðmerking frá Kára á Rógvi, eydnaðist ikki at fáa hana áðrenn evstamark blaðsins.

# SEV broytir bygnað

**Elfelagið hevur í morgun havt eyka umboðsmannafund á Hotel Hafnia at viðgera ætlaðu bygnaðarbroytingarnar í felagnum**

BYGNAÐUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Leivur Hansen, formaður í stýrinum fyri SEV*

SEV hevur ofta og títt verið skundsett fyri at vera ein afturlatin og byrokratiskur felagsskapur, sum í mangar mátar minti um stýrið í gamla Sovjetsamveldinum.

Og tað er heldur eingin loyna, at bygnaðurin ikki samsvarar við nútíðina. Ikki fyrr enn fyri góðum ári síðani varð latið upp fyri, at fjølmiðlarnir kundu vera til staðar til umboðsnevndarfundirnar, og stýrið, sum tók við eftir seinasta bý- og bygdaráðsval hevur frá fyrsta degi arbeitt við at broyta bygnaðin, so hann gerst meira tíðarhóskandi og smidligari.

Broytingaruppskotið er í sjey punktum, og tey eru:

1. Umboðsnevndin verður broytt til aðalfund
2. Stýrið verður broytt til nevnd
3. Einstøku økini velja sín nevndarlim á aðalfundinum
4. Avgerðir um fíggjarætlanir verða fluttar til nevndina
5. Ognarviðurskifti og atkvøðubýtið verða óbroytt
6. Kommunala veðhaldsskyldan verður strikað
7. Broytingar fáa virknað frá 1. januar 2009

Í veruleikanum kann sigast, at bert tvey av punktunum hava nakran praktiskan týdning, harav punkt fýra er kollveltandi. Har verður skotið upp, at nevndin skal taka avgerðir um fíggjarviðurskifti felagsins. Tað hevur umboðsnevndin annars higartil gjørt, sjálvt um stýrið í praksis hevur snikkað hesar til hjá umboðsnevndini at góðtaka.

Uppskotið er í tráð við partafelagslógina og ger eisini arbeiðsgongdina munandi smidligari enn í dag.

Fundurin var drúgvari enn væntað, var ikki liðugur áðrenn evstamark blaðsins.

Men sum skiltist á lagnum, fóru broytingarnar at verða samtyktar. Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá bæði FKF og KSF, sum bara høvdu smávegis viðmerkingar.

Eini 60 umboðsnevndarlimir vóru á fundinum.